Le›ur og lakk, takk

Ungar kvinnur í Eysturoynni smæ›ast ikki burtur ímillum. Hendan eiggiliga moyggin er avmynda› uppi á Høganesi í einum Pretty Woman setti úr handlinum hjá Sonnu í Saltangará. Høvu›sráki› millum tær ungu er, at evarska smáu pløggini skulu vera svørt og úr le›ur- ella lakklíki

PRETTY WOMAN. Vi› slagor›unum, »The little Thing for every Body«, selur Sanna Davidsen í Saltangará eysturoyingum frek undirklæ›i av slagnum Pretty Woman. Yngru kvinnunum dámar best evarska smá, svørt pløgg úr ráum tilfari

Myndir: Jens Kristian Vang

Høgni Mohr

Ta› er slutt vi› at vera fitt.

Ungu konufólkini í Eysturoynni hava tveitt einfaldar, slitsterkar sloggitrussur og fitt hvít blondu-undirklæ›i til viks. Tær vilja heldur hava brósthaldarar og trussur úr le›ur- og lakklíki. Og G-strongurin er sjálvkravdur.

Aldursmunur

Ta› er handilin hjá Sonnu Davidsen í Saltangará, sum m.a. selur hesi eggjandi undirklæ›i. Tey, sum keypa undirklæ›i frá Sonnu, eru løtt at bólka. Sambært Oddvá Fossdalsá, krambú›arkonu hjá Sonnu, eru kvinnuligu keypararnir ungir; millum 18 og 25 ár. Menninir, i› eisini keypa frek undirklæ›i (til konurnar), eru nógv eldri; úr 40 árum og eldri.

Ta› loysir seg

Um yngri eysturoyingar eru vor›nir kynsliga djarvari, hevur ikki eydnast okkum at fingi› uppspurt. Men, at heilt ungar kvinnur keypa krunkasvørt undirklæ›i, serliga úr ráum tilfari, kundi bent á, at eitt frambrótandi ættarli›sskifti er vi› at taka seg upp, innanífrá.

Í handlinum hjá Sonnu ver›ur hildi›, at eggjandi undirklæ›i eru ein íløga, sum loysir seg. Serliga í sambandi vi› Eystanstevnu.

Handilin vi› teimum freku undirklæ›unum er í bygninginum hjá Ova Magnussen, har Rúsan og matstovan hjá John somulei›is halda til.

Eystanstevnan 2000

Fríggjadagur 16. juni

18:45	Skrúðgonga. Ítróttarfólk, fimleikarar og skótar við Nes Sóknar Musikkfelag á odda fara frá Býráðshúsunum út á fótbóltsvøllin.
19:00	Eystanstevnan verður sett av Eyðuni Gaardbo býráðslimi. Nes Sóknar Musikkfelag spælir.
19:00	Í sambandi við túsundárahaldi fyri kristniboðanina í Føroyum hevur J.P. Gregoriussen framsýning av kirkjutekningum. Framsýningin letur upp og J. P. Gregoriussen heldur fyrilestur, í fimleikahøllini á Glyvrum.
19:00	Tivoli opið.
19:30	Skemtidystur millum býráðini í Klaksvík og Runavík, Nes, Gøta.
20:00	”Dansbandet” við Robin Eysturoy spælir á Tivoliøkinum.
20:30	Fótbóltur, NSÍ–B68 5. deild. Landskappingardystur.
23:00	Super diskotek verður í Ítróttarhøllini.
23:00	Opið Hús í Missións- og ungdómshúsinum á Glyvrum við sangi o.ø. Til matna verður grýturættur.

Leygardagur 17. juni

12:00	Stórt Buffet borð á Runavíkar Sjómansheimi.
12:00	Fótbóltur, NSÍa–SKÁLAa, gentur 10–12 ár. Landskappingardystur.
12:30	Roysni skipar fyri rennikapping fyri børn upp til 7 ár.
12:45	Roysni skipar fyri rennikapping fyri børn í aldrinum 7 - 12 ár.
13:30	Fótbóltur. 2 deild menn, NSÍ — ROYN. Landskappingardystur.
14:00	Stíggjur opið
15:00	Kappróður.
15:00	Tivoli opið.
15:00	Loppumarknaður, á tivoliøkinum.
15:00	Klovnar selja ballónir á havnalagnum.
15:00	Savnið Forni, á Glyvrum, opið. Í hesum døgum hevur Forni eina sera áhugaverda framsýning um Kristniboðanina í Føroyum.
15:00	Í sambandi við túsundárahaldi fyri kristniboðanina í Føroyum hevur J.P. Gregoriussen framsýning av kirkjutekningum, í fimleikahøllini á Glyvrum.
15:00	Kári Sverrison, Eyðun Lamhauge og Justin Philbrow spæla spælimanstónleik á tivoliøkinum.
15:30	Fótbóltur. NSÍb–SUMBA., smádr. Landskappingardystur.
16:00	Undirhald við tónleiki, Robin Eysturoy skipar fyri.
17:30	Beint eftir róðurin verða steypini handaði av Tórbjørn Jacobsen.
17:30	Fótbóltur, 1 deild menn, NSÍ–B71. Landskappingardystur.
18:00	Grandprix súkkling á havnalagnum. Byrjað verður við Eysturoyar Heilsølu. Barna súkkling verður aftaná.
18:30	Berøa hevur útifund á Tivoliøkinum.
19:00	Fótbóltur, 1. deild kvinnur, NSÍ–B36. Landskappingardystur.
20:00	»Dansbandet« við Robin Eysturoy undirheldur á Tivoliøkinum.
22:00	»Flux« spælir á Tivoliøkinum.
22:00	Opið Hús í Berøa.
23:30	Kjølar spæla til dans í Ítróttarhøllini.
23:30	X-Ray’s spæla til gamlamannadans í Støkk Høllini.
23:30	Nes Sóknar Musikkfelag spælir á Tivoliøkinum.
24:00	Miðnáttarsamkoma á Tivoliøkinum. Olaf Olsen reiðari og fyrrverandi løgtingsmaður heldur røðu. Aftaná verður fýrverkarí og felagssangur.

Sunnudagur 18. juni

11:00	Gudstænasta í Glyvra kirkju. Jónsvein Bech, prestur, prædikar.
12:00	Stórt Buffet borð á Runavíkar Sjómansheimi.
13:00	Svimjifelagið FLOT á Toftum skipar fyri svimjing um fjørðin. Svomið verður av Strondum inn á keiina í Saltangará.
14:30	Ítróttarfelagið Roysni skipar fyri rennikapping fyri vaksin, runnið verður 10 km.
15:00	Tivoli opið.
15:00	Loppumarknaður, á Tivoliøkinum.
15:00	Fimleikaframsýning í Ítróttarhøllini.
15:00	Savnið Forni, á Glyvrum, opið. Í hesum døgum hevur Forni eina sera áhugaverda framsýning um Kristniboðanina í Føroyum.
15:00	Í sambandi við túsundárahaldi fyri kristniboðanina í Føroyum hevur J.P. Gregoriussen framsýning av kirkjutekningum, í fimleikahøllini á Glyvrum,
15:00	Felagið Seglið skipar sum vant fyri kappsigling. Í ár verður Málið á kappróðrarmálinum. Hetta er tann fyrsta av trimum kappsiglingum í ár. Hinar verða á Kollafirði 1. juli og á Hvítanesi 22. juli.
16:00	Almennur fólkafundur á parkeringsøkinum við Brotið. ”Hesuferð” skipar fyri.
16:00	Køkutombula í forhøllini í Ítróttarhøllini.
18:00	Barnakonsert í Støkk høllini. Við Trølla Pætur, sum kemur á staðið við Brandbilinum.
18:00	Evangeliskt møti í Berøa.
19:00	Møti í Missións- og ungdómshúsinum á Glyvrum.
21:00	Hugnaløta við sangi, tónleiki og skemti í Ítróttarhøllini í Runavík.



Vit ynskja øllum eina góða Eystanstevnu



Runavíkar Kommuna.

Sosialurin - 311820